

## 22 milliardir í obligatiónum

Danski tjóðbankin skrivar í dag út 22 milliardir í realkreditt obligatiónum, og slær harvið mynt av nýggja hjálparpakkanum, sum skal linka trýstið á pensjónssektorinum, og ikki minst á danska realkreditt marknaðin. Í kjalarvørrinjum á dagsins útskriving er staturin komin á vøllin við Den Sociale Pensionsfond (DSP), sum hevur stuðlarkeypt realkreditt obligatiónir fyri 22 milliardir krónur fyri at verja risastóra trýstið á realkreditt marknaðin. Tað skrivar TV2 Finans sum skilir, at tjóðbankin eftir dagsins útskriving er á veg við einari nýggjari røð av 30 ára obligatiónum. – Í einari tíð við fíggjarligum órógvi er tað skilagott, at staturin ger íløgur í einum parti av ognunum hjá DSP í realkreditt obligatiónum, so rentuinntøkur og útreiðalur í størri mun passa saman, sigur fíggjarmálaráðharrin, Lars Løkke Rasmussen við Ritzau.

# Spennandi frásagnir úr hinum heiminum

**Í morgin leggur Petur Jacob Sigvardsen fram nýggja bók, ið nevnist »Hin heimurin 1«. Í bókini eru 197 ymiskar frásagnir frá fólki, ið hava upplivað nakað út yvir tað vanliga. Tað er Edward Fuglø, ið hevur prýtt bókina við tekningum**

BÓKAÚTGÁVA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað eru nú um tvey ár síðani, at Petur Jacob Sigvardsen gav út stóra verkið um torv, eitt verk í fimm bindum.

Tað var í sambandi við tað arbeiðið, at Petur Jacob Sigvardsen fekk mong heimildarfólk. Prátið fall ofta á løgnar hendingar, og ofta endaðu fólk sínar frásagnir við at siga »eg veit ikki, hvat tað var sum hendi, men tað var ikki úr hesum heimi«. Harav heitið á bókini.

Petur Jacob Sigvardsen hevur eisini skrivað Gjáarsøgu, og eisini í tí sambandinum fekk hann nógv heimildarfólk, sum hava upplivað yvirnáttúrligar hendingar.

Eg havi sjálvandi verið noyddur at redigera eitt sindur í tekstinum, men eg havi í øllum førum ringt aftur til heimildarfólkini og lisið frásøgnina upp fyri teimum, fyri at tryggja mær, at eingin misskiljing er í, sigur Petur Jacob Sigvardsen.

Hendingarnar eru býttar upp í umleið 20 høvuðsbólkar, og sjey teirra eru í hesum fyrsta bindinum, sum millum annað umfatar dreymar, sjónir og forsagnir.

Fleiri av hendingunum hava verið av so viðbreknum slag, at keldurnar hava vilja verið ónevndar, og tað havi eg sjálvandi játtað, sigur Petur Jacob Sigvardsen.

### Fyrsta av sínum slag

Hann hevur víst Jóan Paula Joensen handritið, mest tí at hendingarnar í bókini liggja innan hansara starvsøki sum fólkalívsfrøðingur, og hann bjóðaði sær at skriva inngangin í bókini, og tað er Petur Jacob Sigvardsen honum ógvuliga takksamur fyri.

Hetta er fyrstu ferð, at slíkar hendingar eru festar á blað, nakað, sum annars bert hevur gingið munn av munni manna millum.

Talan er um slakar 200 søgur, og næstan alt tilfarið er nýtt. Onkrar søgur eru við í savninum um torvið og onkur í Gjáarsøgu, men tað eru kanska 20 av teimum 200 søgunum, sum hava verið á prenti fyrr, sigur Petur Jacob Sigvardsen.

Søgurnar eru ógvuliga ítøkiligar, serliga dreymarnir og sjónirnar, og Petur Jacob Sigvardsen gevur nøkur dømi.

Ofta eru sjónirnar soleiðis, at ein heil fjallmanning kann síggja eina morðreyða ær, sum eingin kennist við. Menn síggja hana fara inn í rættina, men tá teir so skulu til at taka hana, so er hon ikki har, sigur Petur Jacob Sigvardsen.

### Skrivar hvønn dag

Eitt annað evni, sum verður umrøtt í bókini, er fyriboðan. Fólk uppliva nakað, sum fer at henda seinni. Høvundurin tekur enn eitt dømi fram.

Talan var um eina konu, sum sá inn í ein garð. Har stóðu fýra trø. Tað eina var svart við ongum greinum, tað næsta hevði bara fáar blómur, tað triðja heldur fleiri og hitt fjórða eitt sindur fleiri. Innan fyri ein mánaða eftir hetta, doyði mamma at konuni og tríggjar av hennara nærmastu, ein, sum stóð henni nær í 50-unum og tvær, sum somuleiðis stóðu henni nær í 60-unum, greiðir Petur Jacob Sigvardsen frá.

Annað dømi er um, at ein pápi tekur ímóti soni sínum, sum kemur aftur av skipi, og talar um stóra sjógvin, sum skipið hevði fingið. Men eingin hevði umrøtt hetta fyri pápanum.

Søgurnar eru sum nevnt nógvar, og Petur Jacob Sigvardsen er komin meiri enn í helvt við næsta bindið.

Eg skrivi hvønn dag, og havi einar 300 søgur niður fyri, og tað leggjast søgur aftrat nærum hvønn dag, sigur Petur Jacob Sigvardsen.

Hann vónar, at næsta bindið í røðini verður klárt til útgávu um hesa tíðina komandi ár, um lív og heilsa verður.

Bókin verður framløgd í Miðlahúsinum í morgin, týsdagin 4. november klokkan 16, tá høvið eisini verður hjá fólki at fáa bókina signeraða av høvundanum. Bókin er umleið 250 síður, kostar 299 krónur og er prýdd við tekningum av Edward Fuglø.




*Petur Jacob Sigvardsen við fyrsta bindi av »Hin heimurin«*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Fundarsamtykt frá landsfundi Sjálvstýrisfloksins, leygardagin 1. novembur 2008

Landsfundur Sjálvstýrisfloksins mælir til, at skúlar verða lagdir um alt landið við tí endamáli:

- at skúlaskapur og mentan miðvíst verða nýtt at tryggja arbeiði og menning í øllum Føroyum
- at bjóða ungdómi og lærdum fólki heimaftur
- at gera Føroyar part av alheiminum við opnum favni fyri tilflytandi fólki at lesa og virka í Føroyum
- at bjóða ungdómi og fólki betri tilboð
- at skapa arbeiðspláss, vinnuhøvi og áhugaverdari nærumhvørvi.

**Umhvørvið:** Landsfundurin mælir til, at farið verður undir umhvørvisvinarliga reinar orkukeldur, so sum vind, vatn, sól og alduorku og at fyrimunir verða veittir húsarhaldum, ið taka fyrilit fyri varandi orku.
**Fólkaræði:** Landsfundur Sjálvstýrisfloksins átalar harðliga rákið í seinastuni ímóti framsøgufrælsinum og kvinnuumboðan í politikki.
**Løgmaður:** Landsfundurin heldur, at undirtøka er í tjóðini fyri beinleiðis valdum løgmanni, og at henda lógarbót eigur at fremjast skjótast gjørligt.
**Ísland:** Landsfundurin mælir til at Føroyar stuðla Íslandi ígjøgnum fíggjarkreppuna og átalar, at Stóra Bretland hevur skatt trúvirðið hjá Íslandi og javnsetir íslendskan banka og ognir við lond sum Norðurkorea og yvirgangsfelagskapirnar Al Qaida og Taliban.
**Kommunuval:** Fyri at tryggja mentanarstovnar, ungdómshús og alneyðugar ábøtur á eldraøkinum, heitir landsfundurin á sjálvstýrisveljarar um at fara á kommunuval og velja Sjálvstýrisflokkin í Klaksvík og Tórshavn og tey sjálvstýrisvalevni, ið eru uppstillað á breiðum listum kring landið.
**Landspolitikkur:** Landsfundurin harmast at kalla stjórnarloysinum, sum valdar í landinum, nú BAC stýrið hevur býtt valdið á skinninum. Landsfundurin vísir á, at ongar veruligar samráðingar eru um politisk tiltøk. Landsfundurin staðfestir, at fíggjarlógaruppskotið einans er ein teknisk framskriving og harmast, at søguliga skúlasemjan um Skúladepil úti við Marknagil er tveitt út í óvissu.

**Vegna landsfund Sjálvstýrisfloksin**
**Kári P. Højgaard, formaður**